# Støry á Rúsdrekkasølu Landsins



## Ordramóttøkan/avgreiðslan í Havn

**Arbeiðsuppgávur:**
- telefonavgreiðsla
- ordramóttøka og greiðsla av stórordrum, postordrum og tollfríum ordrum
- kundaráðgeving
- fakturar
- skrivarauppgávur

**Førleikakrøv:**
Fakligir førleikar
- handils- ella skrivstovulærd/-ur
- vøruvitan (servitanarstøði)
- bókhaldsvitan og royndir
- dugir at veita góða telefontænastu
- góðir málsligir førleikar

Persónligir førleikar
- dugir at veita góða tænastu
- service-mind'að/-ur
- strukturerað/-ur
- dugir at ráðgeva (krevur m.a. vøru- og matvitan)

**Setanartreytir og løn:**
Starvið verður sett tann 1. mars 2007, ella skjótast gjørligt. Tann, sum settur verður, kann roknað við møguligum broytingum í starvinum. Arbeiðstíðirnar eru skiftandi.

Starvið verður sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Starvsmannafelagið, og er í løtuni flokkað í lønarflokki 2.

Meira fæst at vita við at ringja til Elsu Mariu Olsen á tel 31 42 77

## Goymslufólk á Hjalla

**Arbeiðsuppgávur:**
- vørumóttøka
- pakka ordrar
- koyra vøru út
- røkja goymsluna
- og annað arbeiði, sum knýtir seg til goymsluarbeiði

**Førleikakrøv:**
Søkt verður eftir tilkomnum, raskum fólki; koyrikort krevst. Um viðkomandi ikki hevur trukkoyrikort, verður neyðugt at taka tað. Neyðugt er við teldukunnleika á brúkarastøði. Tað kann verða tungt arbeiði, so tann, sum settur verður, má vera likamliga væl fyri.

**Løn- og setanartreytir:**
Starvið verður sett tann 1. mars 2007, ella skjótast gjørligt. Starvið verður sett sambært sáttmála millum Fíggjarmála-ráðið og Starvsmannafelagið.

Meira fæst at vita við at ringja til deildarleiðaran, Martin Enok Jespersen á tel 31 42 77

## Krambafólk í Saltangará og Klaksvík

**Arbeiðsuppgávur:**
- ráðgeva kundunum
- sita við kassan
- fylla vørur á hillar
- taka ímóti vørum/ goymsluarbeiði
- og aðrar uppgávur í samband við handilin

**Førleikakrøv:**
Fakligir førleikar og royndir
- handilslærd/-ur; ella tilsvarandi førleikar/ royndir
- dugir at veita tænastur á høgum støði
- hevur/ ynskir at fáa bygt upp servitan um okkara vørur
- dugir at veita ráðgeving til viðskiftafólkið
- likamliga og sálarliga væl fyri

Persónligir førleikar
- service-mind'að/-ur
- lagalig/-ur og fleksibul (skiftandi arbeiðstíðir og uppgávur)
- duga at handfara truplar kundar
- samskiftis- og samstarvsførleikar
- reiðilig/-ur í orð, tal og gerningum
- virka fyri at fyritøkan verður ment á tænastu-økinum

**Løn- og setanartreytir:**
Størvini verða sett tann 1. mars 2007, ella skjótast gjørligt. Størvini verða sett sambært sáttmála millum Fíggjarmála-ráðið og Starvsmannafelagið.

Meira fæst at vita við at ringja til deildarleiðaran í Saltangará, Fríðbjørg Weihe, á tlf 44 92 77, ella deildarleiðaran í Klaksvík, Bjørg Sundskarð, á tel 45 64 77

**Rúsdrekkasøla Landsins**
*Hoyvíksvegur 51 Postboks 3069 FO-110 Tórshavn*
*Tel (+298) 31 42 77 Fax (+298) 31 22 60*

**Umsóknarfreist:**
Umsóknir skulu verða okkum í hendi í seinasta lagi hósdagin tann 11. januar 2007
**Og sendast til:**
Skrivligar umsóknir við avritum og viðmælum skulu sendast til: Hoyvíksveg 51, Postboks 3069, FO-110 Tórshavn, stílast til Elsu Mariu Olsen, stjóra. Tilskilast má í umsóknini, hvørja deild søkt verður til.

*Rúsdrekkasøla Landsins hevur 6 sølustøð kring landið, 1 høvuðsgoymslu og harafturat 1 leiðslu- og fyrisitingardeild í Tórshavn. Rúsdrekkasølan skal tryggja, at lógir og ásetingar á økinum verða hildnar, og starvsfólkini hava ein virknan leiklut í hesum málsetningum. Tí er neyðugt at starvsfólk, ið sett verða, eru reiðilig, ynskja at virka innan almennu ásetingarnar og innanhýsis reglugerðir og mannagongdir, og at tænastustandardurin verður fylgdur. Rúsdrekkasølan ynskir at virka við til støðuga førleikamenning av starvsfólkunum, og at førleikamenning gerst natúrligur táttur av arbeiðnum á Rúsdrekkasøluni. Starvsfólk, sum sett verða, mugu ikki vera undir 18 ár.*

